Amerada og føroyingar bora í juli

Jan Evensen, stjóri hjá Amerada Hess hevur seta gó›ar vónir um komandi leiting. Vi› li› hansara Ben Arabo, stjóri á føroyadeildini hjá Amerada Hess.

Mynd Alvur Haraldsen

Nú er loksins greitt, at tr‡ av samtøkunum, sum hava fingi› leitiloyvi á føroyska landgrunninum, fara at bora í næsta ár. Stjórin í Amerada Hess, Jan Evensen sigur, at teir fara at bora í juli. Herfyri bo›a›u Statoil og BP frá, at tey fara at bora í ávikavist juni og august.

OLJULEITING
Jan Müller

Amerada Hess og hini feløgini í The Faroes Partnership, British Gas, Dong og Atlants Kolvetni eru klár til at fara undir boring á føroyska landgrunninum. Jan Evensen, stjóri sigur, at teir hava tiki› avger› um at bora í juli næsta ár. Teir hava gjørt av at kalla prospektini, tvs. tey økini, har teir meta olja finst, upp eftir føroyskum kvinnunøvnum. Fyrsta prospekti› teir fara at bora í hevur fingi› navni› Marjun. Ta› er 3000 til 4000 metrar ni›ri í undirgrundini. Teir vita so gott sum fyri vist nú, hvar teir fara at seta borin í. Vatnd‡pi› er umlei› 1000 metrar. Talan er um at bora ni›ur á somu løgini, har oljukeldurnar Schiehallion og Foinaven liggja á bretskum øki. Sannlíki› fyri at finna olju her er sera stórt sigur Jan Evensen. Teir skulu so bora enn eitt hol í ár 2002, og tá er ætlanin at fara uppaftur djúpri, tvs. heilt ni›ur á 5000 til 6000 metrar. Prospektini, i› liggja djúpri, hava fingi› føroysk mannfólkanøvn. Sta›i› har teir fara at seta borin longu í næsta ár er 6004, 16 og liggur nakrar fáar kilometrar frá markinum. Næsta borista›i› er í 6005,20.

Jan Evensen ivast onga løtu í, at olja ver›ur funnin á føroyska landgrunninum. Prospekti› teir fara at bora í er í heimsflokki sigur hann. Ver›ur olja funnin næsta summar, so vónar hann, at talan ver›ur um eitt felt á stødd vi› Schiehallion tvs. uppá einar 300 til 400 mill. føt. Hann útilokar ikki, at teir kunnu finna bæ›i størri og minni felt. Prospektini eru í fleiri løgum og síggja lovandi út og eru tey eisini tøkniliga sæ› ein stór avbjó›ing.

– Vit hava brúk fyri einum felti uppá 300 milliónir føt fyri at kunna fara undir lønandi framlei›slu. Men ger BP eitt fund uppá 200 mill. føt og vit gera eitt uppá somu stødd, so er greitt, at vit kunnu samarbei›a um útbyggingarloysnir og rørlei›ingar ella finna eina felags útbyggingarloysn, sum ger, at lønsemi fæst. Me›an BP ætlar at bora tveir brunnar næsta ár fara Amerda Hess og Statoil at bora hvør sín brunn. Teir f‡ra brunnarnir, sum so fara at ver›a bora›ir aftrat í 2002 eru eisini rættiliga avgerandi fyri framtí›ina hjá økinum. Teir fara at siga naka› um framtí›ar møguleikarnar. Alt í alt er øki› millum Føroyar og Hetland eitt fyrsta klassa øki heldur Jan Evensen. Ta› kann gerast ein t‡andi n‡ggj oljuprovins í Vestureuropa. Kemur gongd á at útbyggja fleiri felt aftrat, so ver›ur ta› virkuliga nógv virksemi í øknum, og ta›, sum hendir á bretskum øki kann fáa stóran t‡dning fyri ta›, sum hendir á føroyskum øki og øvugt.



Pílurin vísir, hvar Amerada Hess og hini feløgini í bólkinum fara at bora í juli næsta ár. Hin krossurin vísir, hvar teir fara at bora í 2002

Úr Føroyum til Vietnam

OLJULEITING OG STARVSFÓLK
Jan Müller

Ta› henda alla tí›ina stórar broytingar innanh‡sis í stóru altjó›a oljufeløgunum, og her er Amerada Hess einki undantak. Eftir at hava sta›i› á odda fyri kanningunum hjá Amerada Hess í føroyska økinum nú í skjótt fimm ár skal Jan Evensen, sum er nor›ma›ur, til Saigon í Vietnam at arbei›a í nøkur ár. Har leita Amerada Hess eftir olju saman vi› vietnamesiskum feløgum. Jan Evensen fer kortini at fylgja gongdini í Føroyum og fer at vitja her av og á sum partur av Føroyadeildini hjá felagnum. Steve Boulder, sum í dag starvast á skrivstovuni hjá Amerada Hess í Aberdeen, fer at avloysa Jan Evensen í Føroyum. Annars ver›ur ta› framhaldandi Ben Arabo, sum fer at standa á odda fyri skrivstovuni í Føroyum.

– Eg havi veri› sera fegin um at arbei›a saman vi› føroyskum myndugleikum, og haldi eisini, at vit hava lagt eitt gott grundarlag fyri ví›ari samarbei›i. Eg havi stórar vónir til at finna olju og somulei›is haldi eg, at vit fara at megna at geva føroyskum vinnulívi arbei›i umframt at vit koma at nerva verandi føroyska vinnu minst møguligt.

Jan Evensen heldur føroyskir myndugleikar hava gjørt eitt gott arbei›i fyri at fáa vinnulívi› vi›. Hjá Amerada Hess eru teir nú í fer› vi› at menna føroyska vinnu, og sjálvt um eingin olja ver›ur funnin, so fer hetta arbei›i› at gagna vinnulívinum.

Antin føroyska ella skotska tilbúgving

Ver›a føroyingar ikki klárir vi› eini fullfíggja›ari tilbúgving til tí›liga í næsta ár kann alternativi› gerast, at oljufeløgini fara at troyta tilbúgvingina í Skotlandi

OLJA OG TILBÚGVING
Jan Müller

Nú ta› nærkast oljuleiting á landgrunninum sigur Jan Evensen, stjóri hjá Amerada Hess, at ta› einasta, sum ikki er klárt, er tilbúgvingin á føroyskum øki. Hetta er eitt mál hann hevur gjørt vart vi› á›ur og dylur hann ikki fyri, at ta› ver›ur ein stór avbjó›ing at fáa hana uppá pláss til boringina næsta ár. Ver›ur ein føroysk tilbúgving ikki klár, so er ta› sjálvandi ein møguleiki at brúka Aberdeen sum tilbúgvingarmi›stø› fyri leitingina á føroyskum øki. Jan Evensen sigur, at einki er til hindurs fyri tí, tí eingin munur er á at bora ein brunn á bretskum øki og so á føroyska landgrunninum. Men ta› hevur so veri› eitt ynski frá føroyskum myndugleikum, at hesi vi›urskiftini ver›a st‡rd og handfarin úr Føroyum. Undir øllum umstø›um mugu hesi vi›urskiftini ver›a púra grei›, tá fari› ver›ur at bora, tvs. um feløgini skulu kontakta løgregluna í Havn ella løgregluna í Aberdeen og hvør hevur ábyrgdina av bjarging, hvør stendur fyri tyrluflutningi osfr. Jan Evensen sigur, at ábyrgdarb‡ti millum føroyskar og bretskar myndugleikar má vera klárt til endan av februar ella byrjanina av mars.

Vit spurdu Jan Evensen, sum nú í fimm ár hevur kunna› fylgt vi› í or›askiftinum í Føroyum um komandi virksemi›, hvørjar tankar hann hevur gjørt sær um tey ymsu málini, eitt nú um or›askifti› í Føroyum um almenna føroyska luttøku. Hann sigur, at ta› øki›, sum er prospektivt í løtuni, tvs. har møguleikar eru at finna olju, er sera avmarka› í stødd og heldur hann ta› vildi veri› skeivt út frá hesi útbjó›ingini aleina at skipa› eitt føroyskt alment oljufelag. Ta› fer at ver›a sera resursukrevjandi. – Tit hava longu eitt privat felag, sum er vi› í okkara bólki, og eg trúgvi, at hetta fer at mennast til eitt veruligt oljufelag sum frálí›ur. Eftir tí sum Sosialurin skilur, so kann ta› almenna í Føroyum seta upp til 20% í hetta felagi›, um áhugi er fyri tí.

Hóast hann umbo›ar eitt oljufelag, og tí kanska ikki er tann rætti at úttala seg, so heldur Jan Evensen kortini, at føroyska samfelagi› hevur tryggja› seg væl til at fáa nokk burtur úr gjøgnum skattin og tey føroysku privatu feløgini.

– Skattaskipanin tit hava bygt upp er gó› fyri Føroyar. Ta› er heldur eingin ivi í mínari ver› um, at myndugleikarnir gjøgnum sína løggávu og sín loyvispolitikk hava tryggja› Føroyum stóran lut í komandi inntøkum. Undir øllum umstø›um er undirgrundin og møgulig kolvetni føroyska ogn. Vit hava so átiki› okkum at vága nakrar pengar fyri at finna hesi vir›ini.

Fáa tveir b‡rá›sformenn á Tvøroyri tey næstu f‡ra árini

Tey næstu f‡ra árini koma hesir bá›ir at b‡ta borgarstjórastarvi› á Tvøroyri ímillum sín. Vinstrumegin er ta› sambandsma›urin Finnleif Guttesen, sum ver›ur borgarstjóri hesi bæ›i fyrstu árini í valskei›num. Høgrumegin er ta› uttanflokkama›urin, Kristin Michelsen, sum ver›ur borgarstjóri tey bæ›i seinnu árini

– Afturfyri at lata b‡rá›sformannin frá sær, fær javna›arflokkurin á Tvøroyri formannin og meirilutan í øllum nevndunum, uttan í fíggjarnevndini og tveimum ø›rum nevndum

KOMMUNUVALI‹
Áki Bertholdsen

Ta› leika›i hart á, men um vikuskifti› eydna›ist kortini at skipa n‡ggja samgongu í Tvøroyrar B‡rá› eftir kommunuvali› seinasta t‡sdag.

Ta› var beinanvegin greitt, at ta›, sum fyrst lá í luftini, var at skipa eina samgongu ímillum javna›arflokkin, sum hev›i tríggjar b‡rá›slimir og umbo›i› fyri ávikavist sambandsflokkin og uttanflokkalistan.

Og eftir fleiri samrá›ingarfundir eydna›ist hetta um vikuskifti›

Hendan samgongan hevur fimm av teimum sjey b‡rá›slimunum. Sostatt koma teir bá›ir b‡rá›slimirnir hjá samgongulistanum, Bergur Bærentsen og Dan Nielsen, sum í løtuni er b‡rá›sforma›ur, at sita í andstø›u í næsta valskei›i.

Tveir b‡rá›sformenn

Ta› tyngsta taki› í hesum samrá›ingunum var at fáa semju um, hvør skuldi vera borgarstjóri á Tvøroyri tey næstu f‡ra árini.

Sverri Midjord duldi onganti› fyri, at hann fór at krevja starvi›. Ta› hev›i hann eisini allar grundir til, tí hann fekk nógv flestar atkvø›ur av øllum teimum, sum vór›u valdir. Hartil umbo›ar hann javna›arflokkin, sum er nógv størsti flokkur í samgongu.

Men so lætt gekk ta› ikki og tá i› avtorna›i, máttu bæ›i Sverri Midjord og javna›arflokkurin sleppa kravinum um at fáa borgarstjóran, fyri yvirhøvur at fáa semju um hesa samgonguna.

Ísta›in bleiv semja um, at teir bá›ir smáu flokkarnir skuldu skiftast um at hava b‡rá›sformannin.

Sostatt ver›ur Finnleif Guttesen úr sambandsflokkinum b‡rá›sforma›ur á Tvøroyri tey fyrstu tvey árini av valskei›num. Hini bæ›i árini ver›ur Kristin Michelsen, sum var› valdur á uttanflokkalistanum, b‡rá›sforma›ur.

Hinvegin ver›ur Sverri Midjord varaborgarstjóri í b‡rá›num øll f‡ra árini.

Tey tr‡ umbo›ini fyri javna›arflokkin í Tvøroyrar B‡rá› eru Sverri Midjord, Pauli Einarsson og Heri Mortensen.

Fáa allar formenninar

Men afturfyri fær javna›arflokkurin bæ›i formannin og meirilutan í øllum nevndunum hjá b‡rá›num uttan í tveimum. Ta› eru tríggir limir í hvørjari nevnd, og javna›arflokkurin fær formannin í teimum øllum, og harafturat fær hann tvey umbo› í øllum nevndunum, uttan í mentanarnevndini og teirri n‡ggju umhvørvisnevndini.

Fíggjarnevnd er eitt undantak, tí har er b‡rá›sforma›urin føddur forma›ur. Men hitt umbo›i› fyri samgonguna ver›ur Sverri Midjord.

Í teknisku nevnd ver›ur Heri Mortensen forma›ur og Pauli Einarsson, nevndarlimur. Í vinnu- og havnanevndini ver›ur Heri Mortensen forma›ur og Sverri Midjord nevndarlimur. Í sosialu nevnd ver›ur Sverri Midjord forma›ur og Heri Mortensen nevndarlimur.

Í mentanarnevndini ver›ur Pauli Einarsson forma›ur og Kristin Michelsen ver›ur nevndarlimur tey bæ›i fyrru árini í valskei›num og Finnleif Guttesen tey bæ›i seinnu.

Annars ver›ur ein n‡ggj nevnd skipa› undir b‡rá›num hetta valskei›i›. Ta› er ein umhvørvisnevnd, sum Pauli Einarsson ver›ur forma›ur í. Hitt umbo›i› fyri samgonguna ver›ur Kristin Michelsen tey fyrstu tvey árini og Finnleif Guttesen tey bæ›i næstu árini.

Hetta er ein nevnd, sum samgongan heldur, at ta› er ney›ugt at skipa vi› teimum vaksandi krøvum, sum ver›a sett til umhvørvisvernd. Ikki minst heldur samgongan, at ta› er ney›ugt at skipa hesa nevndina, nú oljuvinnan stundar til.

Fiskur, jar›skjálvtar og føroyskar bókmentir

TÍ‹INDASKRIV

N‡tt Frø›i er komi› út, og greinirnar í almenna vísindaliga tí›arritinum nema hesa fer› vi› so fjøltátta› evni sum fisk, jar›skjálvtar í Føroyum og føroyskar bókmentir.

Malan Marnersdóttir, bókmentafrø›ingur og rektari á Fró›skaparsetrinum, fer í næstum at verja doktararitger› sína um føroyskar bókmentir. Í drúgvari grein vi›ger hon føroyskar bókmentir frá aldaskiftinum til í dag. Hon l‡sir, hvussu føroysk skaldsøguskriving mennist samanbori› vi› mentanarligu og málsligu stø›una.

Havi› og tilfeingi› úr havinum hava sum vera man ein t‡andi leiklut í føroyskari gransking og tí eisini í Frø›i. Eilif Gaard, fiskifrø›ingur á Fiskirannsóknarstovuni, grei›ir frá toskinum á føroyska landgrunninum og gevur lesaranum innlit í serligu g‡tingarvi›urskiftini hjá landgrunstoskinum.

Ofta ver›ur tosa› um, at vit mugu fáa meir burtur úr fiskiríkidøminum vi› øktari gó›sking. Heilsufrø›iliga Starvsstovan skipa›i í summar fyri eini rá›stevnu um menning av ídna›arfiski, har i› útlendskir serfrø›ingar luttóku. Bjørt Samuelsen, matvøruverkfrø›ingur og journalistur, hevur havt samrø›ur vi› fleiri av luttakarunum, og vísa teir á áhugaverdar møguleikar fyri at menna fiskaúrdráttir.

Skulu vit vænta jar›skjálvtar í Føroyum? Eftir smáu ristingarnar í Su›uroy fyri nógvum árum sí›an er ikki løgi› um onkur spyr, hvussu stórur møguleikin er fyri rættiligum jar›skjálvtum í Føroyum. Fyri umlei› einum ári sí›an var› ein jar›skjálvti máldur undir Lúsabanka, og var ta› bert fáar vikur eftir, at fyrstu seismisku mátingarstø›irnar í Føroyum vóru uppsettar. Heri Ziska, jar›alisfrø›ingur á J a r › f r ø › i s a v n i n u m, grei›ir frá, hví jar›skjálvtar koma í og hvussu jar›skjálvtar ver›a máldir í Føroyum.

Frø›i kemur út tvær fer› um ári› og kostar 48 í leysasølu. Ta› ber til at gerast haldari fyri kr. 84 um ári›.